# Hølir til leigu

3 hæddir á 200 fermetrar til leigu á Argjavegi 26, Argir.
Hølini, sum kunnu útleigast samlað ella hvør sær, kunnu nýtast til ymisk endamál og innrættast eftir tørvi.
Góð parkeringsviðurskifti við plássi til 22 bilar.

Meiri fæst at vita á www.busetur.fo ella við at venda sær til Sjúrður Holm, tlf. 210830 / 310830.

**BUSETUR**
Tel 310 830 | www.busetur.fo

# Leyst starv

SKÓGRØKT LANDSINS

Starvið sum røktarleiðari á Gróðurstøðini (plantuskúlanum) hjá Skógrøkt landsins er leyst at søkja til setan 1. apríl 2006.

Røktarleiðarin virkar undir leiðslu av landsskógarvørðinum, og við tilvísing til hansara. Eftir fyriskipan hevur røktarleiðarin um hendi dagligu praktisku leiðsluna av virkseminum og arbeiðsmegini, ið hoyrir til Gróðurstøðina. Reglugerð er fyri starvið.

Vit sóknast eftir umsøkjarum við førleika ájavnt við støðið í norðurlendsku útbúgvingunum til jordbrugsteknolog ella til gartnara. Annar viðkomandi yrkiskunnleiki kann tó eisini góðtakast.

Starvið verður lønt eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til landsskógarvørðin á telefon 310922/210966 ella við telduposti til: trondur@skogroktin.fo

Skrivlig umsókn, við avritum av próvskjølum, viðmælum v.m., skal vera stovninum í hendi í seinasta lagi mikudagin 15. mars 2006. Umsóknin skal sendast til:

**Skógrøkt landsins**
Hvítanesvegur 3 · Postrúm 1174 · 110 Tórshavn
Teldupostur: skogroktin@skogroktin.fo

*Skógrøkt landsins er stovnur undir Innlendismálaráðnum og innur uppgávur og áhugamál Skógfriðingarnevndarinnar. Stovnurin skal røkja gamlar og nýggjar viðarlundir og aðrar frílendisuppgávur, sum hoyra uppí. Somuleiðis rekur stovnurin Gróðurstøðina við plantualing, plantusølu og arboretvirksemi.*

## Søkt verður eftir
# Skipara/stýrimanni

**Starvið:**
Er innan offshore vinnu, herundir oljuvinnu, kápulvinnu o.a.

**Krøv og ábyrgd:**
Viðkomandi kemur at hava ábyrgd av, at formligu reglur á økinum, verða fylgdar, og at arbeiðsgongdir eru í tráð við málsetningin hjá fyritøkuni.

**Førleikakrøv:**
- Vinnubræv sum skipsførari/skipari við STCW átekning
- Heilsuprógv, ikki eldri enn 2 ár
- Trygdarskeið, ikki eldri enn 5 ár
- Roykkavara/sløkkileiðara skeið
- GMDSS skeið
- ARPA skeið
- Kunnleika til ISM og ISO 9000 góðskustýring.

**Løn og setanartreytir:**
Verður sett eftir avtalu.

Umsóknin saman við avriti av prógvum og møguligum ummælum, skulu vera okkum í hendi skjótast tilber.

Nærri upplýsingar kunnu fáast við at venda sær til Gunnbjørn Joensen, stjóra, tlf. 422503 ella e-mail gunnbjor@thor.fo
ella Justin Philbrow, manning, tlf. 422503 ella e-mail justin@thor.fo

**P/F THOR**
420 Hósvík
www.thor.fo

*P/F THOR, er eitt felag sum eigur og rekur skip í oljuvinnuni, fiskivinnuni og annað virksemi í hesum sambandi. Víst verður til heimasíðu okkara www.thor.fo*

# Sjálvuppgávan 2005

Freistin hjá vanligum skattgjaldarum, ið ikki hava roknskaparskyldu, at lata inn
sjálvuppgávu
kapitalvinningssjálvuppgávu
er mikudagin 15. mars 2006.

Sama freist er galdandi fyri tey, sum hava skyldu at lata inn ognaruppgerð.

Sí eisini bóklingin “Skatturin 2005” og heimasíðuna **www.tollskatt.fo**

**Toll- og Skattstova Føroya**
**Stýrið**

# Ársaðalfundur

Við hesum verður boðað frá, at ársaðalfundur Róðrarsambandsins verður í ÍSF-húsinum leygardagin 1. apríl 2006 kl. 10.00.

Fundarskrá sambært grein 4 í lógunum fyri Róðrarsamband Føroya.

Uppskot um lóg og lógarbroytingar skulu vera nevndini í hendi í seinasta lagi 14 dagar áðrenn aðalfundin. Uppskot í samband við nevndarval skulu somuleiðis vera nevndini í hendi í seinasta lagi 14 dagar áðrenn aðalfundin. Innkomin uppskot verða send feløgunum 8 dagar áðrenn aðalfundin.

**Róðrarsamband Føroya**




# TÓRSHAVNAR KVØLD- OG UNGDÓMSSKÚLI OG LISTASKÚLIN

**Birger Møller heldur hesi skeið í Listaskúlanum, Kongagøtu 7**

**Skeið í olju- og akrylmáling verða:**
1) 17. - 21. mai 2006, í alt 30 tímar
2) 24. - 28. mai 2006, í alt 30 tímar
Kostnaður **800 kr.**/luttakara/skeið

3) 22. - 23. mai 2006, í alt 12 tímar
Kostnaður **350 kr.**/luttakara

**Um øll skeiðini:**
- eru ætlað bæði royndum og óroyndum.
Pláss er fyri 12 luttakarum á hvørjum skeiði.

Tey ið komu á bíðilista í fjørð verða vinaliga biðin um at tekna seg umaftur.

Meira fæst at vita um skeiðini við at venda sær til kvøldskúlan á tel 302472, ella koma inn á skrivstovuna, Frúutrøð 1

**Tórshavnar Kvøld- og Ungdómsskúli og Tórshavnar Listaskúli**
Frúutrøð 1 · Tórshavn · Tel. 317755 · Fax 318250
T-post: kvoldskulin@torshavn.fo

Sosialurin 341800

# Aðalfundur

Aðalfundurin hjá ÍSB verður mikukvøldið 5. apríl 2006 kl. 19.00 í kantinuni í svimjihøllini í Gundadali.

Skrá sambært lógini.

**Ítróttasamband fyri Brekað**

Sosialurin
www.sosialurin.fo